Ingilín Didriksen Strøm
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um lønarviðurskifti í sjúkrahúsverkinum, settur landsstýrismanninum við heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen, (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvørjar grundgevingar eru fyri, at vaskifólkini á Landssjúkrahúsinum fáa lægri byrjanarløn enn vaskifólkini á hinum báðum sjúkrahúsunum?

2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera batar á hesum økinum?

Viðmerkingar:
Í Degi og Viku í gjárkvøldið, 19. november 2020, kom fram, at vaskifólkini á Landssjúkahúsinum fáa lægri løn enn vaskifólkini á hinum sjúkrahúsunum báðum. Meðan vaskifólkini á Landssjúkrahúsinum fáa eina byrjanarløn á kr. 119 um tíman og eina endaløn á kr. 130, so byrja vaskifólkini á eini løn á kr. 130 á hinum sjúkrahúsunum. Eisini varð sagt, at tímalønin sum vaskifólk á sjúkahúsinum sum heild er munandi lægri enn aðrastaðni.

Í innslagnum varð eisini víst á, at hóast reinføri hevur staðið ovarlaga á skránni í ár við koronusmittuni, so kenna vaskifólkini seg ikki vird. Lønin hjá vaskifólkunum er so mikið lág, at fleiri liva undir fátækramarkinum. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi 20. novembur 2020

Ingilín Didriksen Strøm